## Basso viðgongur dopingnýtslu



Ikki er vanligt, at ein súkklari viðgongur sína skyld í doping. Men hetta er nú veruleiki, eftir at italienski Ivan Basso hevur boygt seg. Stóra trýstið frá pressuni og øðrum hevur ikki hildið hann føran fyri at hildið skommina sum loyndarmál longur. Ivan Basso bjóðaði italiensku OL-leiðsluni á fund í gjár, og har viðgekk hann sína misnýtslu av doping. Hann bjóðaði samstundis samgonguni at samstarva viðvíkjandi víðari kanningum av øðrum dopaðum súkklarum.

29 ára gamli Ivan Basso hevur leingi verið mettur sum ein av heimsins bestu súkklarum, og hevur fyrr fingið eitt 2. pláss í Tour de France. Fyri viku síðani segði hann sáttmála sín upp við sítt lið, Team Discovery Channel.

## Hatta er ikki fótbóltur

Jorge Valdano, sum fyri stuttum var ítróttastjóri í Real Madrid, langar nú út eftir Chelseas og Liverpool fyri teirra fótbóltsspæl – ella vantandi fótbóltsspæl. – Chelsea og Liverpool eru bestu dømini um, hvussu framtíðin hjá fótbóltinum sær út. Intensitetur, kollekvtivisma, taktikkur, fysikkur og beinleiðis spæl eru í hásætinum, meðan stuttu sendingarnar, ferðskifti, driblingar og annað undirhald verða strikað. Mourinho og Benitez vóru ongan tíð stórir spælarar sjálvir. Teir høvdu ikki talentið sjálvir, og tí rokna teir ikki við, at teirra spælarar hava talentið til at skapa tað óvæntaða, sigur fyrrverandi heimsmeistarin millum annað.

# Mugu seta sær mál

**- Um føroyskur fótbóltur setur sær eitt mál og arbeiðir miðvíst fram ímóti tí, so fer støðið á fótbóltinum her eisini at hækka, segði svenski landsliðsvenjarin í fótbólti, Lars Lagerback, tá hann hitti føroyskar venjarar um vikuskiftið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað mest umráðandi er, at ferðin á spælinum fæst upp. Tað ræður um at flyta bóltin meira, arbeiða meira, avlevera harðari og renna skjótari, segði Lars Lagerback millum annað, nú hann hevði skeið fyri føroysku venjarunum*

Svenski landsliðsvenjarin í fótbólti, Lars Lagerback, vitjaði um vikuskiftið í Føroyum. Hann hevði skeið fyri føroyskum venjarum fríggjadagin, og fleiri enn 30 venjarar vóru til hetta skeiðið, sum var eitt árligt íblástrarskeið hjá FSF fyri teimum fremstu venjarunum í landinum.

Lars Lagerback greiddi frá sínum arbeiði á svenska fótbóltslandsliðnum, og føroysku venjararnir fingu eisini innlit í spælistílinum hjá svenska landsliðnum, og hvussu hesin spælistílur verður vandur.

- Tað er umráðandi, at ein venjari sleppur at arbeiða í nøkur ár við einum liði, tí um hetta arbeiðið ikki er støðugt, er trupult at fáa úrslit, segði Lagerback, sum síðani 1998 hevur verið venjari hjá svenska landsliðnum – fyrst saman við Tommy Søderberg og síðani sum høvuðsvenjari sjálvur.

- Venjarin er leiðarin fyri liðið, men ein venjari kann ikki gera alt einsamallur. Hann hevur stóran týdning fyri arbeiðið við liðnum, men tað er alt liðið rundan um liðið, sum skapar úrslitið, segði Lars Lagerback.

### Ferðin er á muni

Lars Lagerback legði stóran dent á, at ferð skal verða í fótbóltsspælinum, og at fótbóltsspælarar støðugt arbeiða við at betra um ferðina í sínum spæli.

- Stóri munurin millum góð lið og minni góð lið liggur í ferðini, sum liðini spæla fótbólt. Góðir spælarar og góð lið flyta bóltin skjótari, spælararnir arbeiða skjótari við bóltinum, teir avlevera harðari og renna skjótari.

- Tí skulu spælarar hava ferð á spælinum undir venjing, og venjarin skal støðugt minna teir á at halda ferðini – avlevera harðari og renna skjótari til dømis, segði Lars Lagerback.

Hann helt eisini, at hann kundi geva føroyskum fótbólti góð ráð, hóast hann segði seg ikki kenna umstøðurnar nóg væl.

- Um føroyskur fótbóltur setur sær eitt mál og arbeiðir miðvíst fram ímóti tí, so fer støðið á fótbóltinum her eisini at hækka. Tað er eingin skjótur vegur á mál, tað skal hart arbeiði til, segði Lagerback.

# Havnin og Sandavágur fremst

**Fyrra innleiðandi FM liðkappingin í skúlatelving var í Norðskála/Oyra skúla dýra biðjudag**

TALV
*Tíðindaskriv*



*Nærum 100 telvarar tóku lut, tá fyrra umfarið í FM-kappingini fyri lið var á skránni um vikuskiftið*

*mynd: faroechess.com*

Við 21 liðum vóru umleið 100 skúlaungdómari til kappingina, sum var býtt í tveir aldursbólkar.: 5. flokkur og eldri og 4. flokkur og yngri. Fýra telvarar eru á hvørjum liði, umframt at tveir skiftisleikarar eisini kunnu vera við.

Havnin og Sandavágur sýnast aftur í ár at vera væl fyri í kappingini um FM heitið. Feløgini vunnu FM í fjør og á Oyrarbakka varð hildið á, har slept varð fyri ári síðani. Havnin sigraði tepurt í eldra bólkinum, meðan Sandavágur vann yngra bólkin trygt.

Men eisini aðrir skúlar gjørdu vart við seg. Eitt nú stóðu Vestmanna og Klaksvík seg heilt væl, eins og skúlarnir við Sundalagið og Kollafjørð veruliga høvdu mobiliserað seg.

Eisini ungdómarnir úr Haldarsvík/Tjørnuvík stóðu seg sera væl og smæddust als ikki burtur í fyrstu royndini í talvhøpi. Saman við lokalu telvarunum úr Róki og Hósvíkingum, er veruliga gróðrabotnur fyri spennandi talvumhvørvi í Sundalagnum framyvir.

Seinna innleiðandi FM kappingin verður 13 mai í Sandavági. Síðani verður drigið samanum. Tey seks liðini, sum hava staðið seg best innleiðandi, telva í finalubólki, meðan hini liðini telva í opnum bólki um plaseringar. Finalan verður í Páll-stovu, Tórshavn, 28 mai.

**FM liðkapping 2007 fyri skúlaungdóm**

1. Innleiðandi kapping á Oyri

4. flokkur og yngri (6. umfør)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sandavágur | 19,5 |
| 2 | Klaksvík | 16,5 |
| 3 | Vestmanna | 16,5 |
| 4 | Kollafjørður 1 | 14,0 |
| 5 | Kollafjørður 2 | 12,5 |
| 6 | Haldarsvík 2 | 10,5 |
| 7 | Rókur 1 | 10,0 |
| 8 | Havnin | 9,5 |
| 9 | Haldarsvík 1 | 9,5 |
| 10 | Hósvík | 9,0 |
| 11 | Rókur 2 | 9,0 |
| 12 | Kollafjørður 3 | 7,5 |

**FM liðkapping 2007 fyri skúlaungdóm**

1. Innleiðandi kapping á Oyri

5. flokkur og eldri (9. umfør)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havnin | 30,0 |
| 2 | Sandavágur | 29,5 |
| 3 | Vestmanna | 26,5 |
| 4 | Klaksvík | 25,0 |
| 5 | Kollafjørður 1 | 20,5 |
| 6 | Rókur 1 | 17,0 |
| 7 | Rókur 2 | 15,5 |
| 8 | Haldarsvík | 11,0 |
| 9 | Kollafjørður 2 | 5,0 |